

*Vinirnir úr Friends hildu als ikki, at tað var stuttligt at Cox gjørdi gjøldur við teimum í pilotsendingini av Dirt.*

# Courtney Cox í skittinum

**Courtney Cox, ið heimurin best kennir sum Monicu úr Friends, er næsta Friends stjørnan, ið fær sína egnu sjónvarpsrøð.**

Frammanundan hevur Matt Le Blanc røðina Joey. Røðin hjá Cox eitur Dirt, og í henni spælir hon blaðstjóri á einum slatriblaði. Umframt høvuðsleiklutin skal Courtney Cox eisini vera framleiðari av sjónvarpsrøðini saman við manni sínum David Arquette. Upptøkurnar byrja í næstum og fyrstu partarnir koma á sjónvarpsskíggjan í heyst, skrivar danska TV2 á heimasíðu síni. TV2 veit eisini at siga, at verkætlanin hevur skapt eitt sindur av ónøgd millum hini fimm úr Friends, tí Cox brúkti tey í síni research til pilotsendingina av Dirt. Hon skrivaði yvirdrivnar og ófantaligar søgur um tey. Hetta var eina løtu dekan ov nógv av tí góða fyri fyrrverandi vinirnar. Men tey eru sambært keldum øll vorðin væl aftur.



*Courtney Cox verður aftur á sjónvarpsskíggjanum í heyst í sjónvarpsrøðini Dirt*

# Tungmálms sangarar hjálptu Korn

Korn oddamaðurin Jonathan Davis gjørdist álvarsliga sjúkur dagin fyri, at bólkurin skuldi á pallin á bretska Download festivalinum í vikuskiftinum. Davis endaði á sjúkrahúsinum við álvarsligari blóðsótt, ið kundi havt beint fyri honum, var hon ikki funnin í røttum tíma. Hevði hann fari á pallin, runnið runt og head banga, so kundi hann smollið um við eini heilabløðing. Restin av bólkinum meldaði tó ikki avboð til Download festivalin, har Korn var eitt av høvuðsnøvnunum. Í samráð við Jonathan Davis spældi Korn í staðin við gestasangarum úr bólkunum Slipknot, Devildriver, 10 Years, Skindred og Avenged Sevenfold, skrivar Billboard.com.



*Tungmálms-sangarar stóðu í bíðirøð at hjálpa, tá Korn knappiliga manglaði sangara.*

## VINN EINA DATE VIÐ DAVID

Fyrrverandi boyband stjørnan David Pepke úr C-21 spælir umborð á Norrønu á Ungdómstúrinum '06. Nú fær ein heppin genta møguleikan at sleppa á eina date við David. Tað er Planet.fo í samstarvið við Smyril Line, ið skipar fyri date'ini, ið verður umborð á Norrønu á Ungdómstúrinum '06. Date'in umfatar umframt ein romantiskan døgurða saman við David, ein gongutúr á dekkinum og ein romantiskan dans við fittliga dananum, ið sigst at duga væl at dansa. Harumframt fær vinnarin ein ferðaseðil til Ungdómstúrin við gisting í Couchett.

Fyri at luttaka í kappingini skalt tú vera fylt átjan ár, vera konufólk og hava hug til at fara á date við David. Tú skalt síðan senda eitt teldubræv til planet@sosialurin.fo og greiða frá, hví júst tú skalt sleppa á date við David. Tað verður David sjálvur, ið lesur teldubrøvini og velur vinnaran. David dugur nøkurlunda at lesa føroyskt, men um tú vilt, at hann skal skilja alt teldubrævið, er best at skriva tað á donskum. Royni at vera skikkiligar og sømiligar í teldubrøvunum. Freistin at senda inn teldubrøv er á miðdegi mánadagin 19. juni.

David hevur síðan hann einaferð hevði eina føroyska damu, verið púra forliptur í føroyskum konufólki. Hann segði í samrøðu við planet.fo, at tá C-21 í fjør vitjaðu í Føroyum fór hann í býin at dansa tað eina kvøldið, og tað er ótrúligt, at so nógvar vakrar gentur kunnu vera á einum so lítlum øki. Hann legði dent á at tær vóru festligar og fittar, men samstundis eisini skikkiligar. Tí var hann eisini beinanvegin tilreiðar tá planet.fo í samstarvi við Smyril Line skutu upp, at ein heppin lesari skuldi sleppa á date við honum.



